


# Thor í Hósvík fingið nýggjan stjóra

**Jógvan Hugo Gardar**

14.04.2015 - 16:05

Oljan.fo

P/f Thor í Hósvík hevur fingið nýggjan stjóra. Talan er um Per Lund Gulklett, ið hevur tikið við sum stjóri í P/f Thor frá 8. apríl 2015, skrivar Vinnuvitan.

Per Lund Gulklett er nú stjóri í P/f Thor saman við Hans Andrias Joensen, ið hevur verið stjóri í felagnum líka síðani tað varð stovnað fyri gott 20 árum síðani í 1994 í Hósvík.

Per Lund Gulklett, sum býr í London, hevur verið ein partur av P/f Thor í mong ár. Hann hevur sitið í nevndini í P/f Thor í langt tíðarskeið, og hevur hann myndað nevndina saman við brøðrunum Hans Andrias og Gunnbjørn Joensen seinastu mongu árini. Gulklett er nú farin úr nevndini.

P/f Thor hevur í løtuni fleiri nýbygningar í gerð innan supply og oljuvinnuna, og er eitt av Føroya størstu vinnuligu arbeiðsplássum.